FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 3. mai 2022
J. nr.: 22/07878
Viðgjørt: AE

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-172/2021 frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um grót úr nýggju tunlunum norður um Fjall

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er alt grótið, ið fæst burturúr tunnilsarbeiðinum, umbiðið?
2. Fyriliggur nøkur ætlan, har grótið kann verða gagnnýtt at betra um vegakervið í økinum?

Svar til spurning nr. 1 og nr. 2
Arbeiðið við at gera nýggju tunlarnar norður um Fjall gongur væl. Tunlarnir verða boraðir úr Árnafirði, og verður tað mesta av grótinum tí lagt har í fyrsta umfari, inntil borað er ígjøgnum.

Mett verður, at tað eru umleið 270 túsund rúmmetrar av føstum gróti í tunlunum, ið verður sprongt út. Landsverk sjálvt brúkar eini 120 túsund rúmmetrar av grótinum til vegagerð, íbindingar og tílíkt í sambandi við nýggju farleiðina norður um Fjall. Sostatt er rættiliga nógv avlopsgrót.

Landsverk hevur havt fundir við kommunurnar í økinum, og ynskja tær allar at ogna sær grót til møguligar verkætlanir. Arbeitt verður við eini loysn, har avlopsgrótið verður deilt lutfallsliga millum kommunurnar í økinum. Kommunurnar avgera síðan sjálvar, hvat tær brúka grótið til.

Tað hevur verið alment frammi, at Klaksvíkar kommuna ætlar at brúka grót út bergholunum til at útbyggja bátahylin í Árnafirði. Møguleikin hevur eisini verið nevndur um at brúka grót til eina útfylling í Norðhavnini í Ánunum. Hetta ræður kommunan sjálv fyri.

Samanumtikið verður grótið eftir ætlan brúkt til vegagerð hjá Landsverki í sambandi við nýggju farleiðina norður um Fjall, og verður avlopsgrótið síðan lutað sundur til kommunurnar. Landsverk hevur tó gjørt innleiðandi kanningar, um ábøtur kunnu gerast á landsvegnum, har grótið eisini kann verða gagnnýtt.

Tinganes, 3. mai 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum